

# Vestmenn

Upprunaliga manningin í Vestmonnum savnast, og tey fara at spæla til rimmar konsert á Summar Festivalinum.

Tað var í 1983, at Vestmenn komu inn á føroyska tónleikapallin við einum braki. Fyrsta útgávan hjá teimum, Brot, seldi fleiri túsund eintøk fyrstu vikuna, og Vestmenn gjørdist ein tann fólkakærasti føroyski bólkurin í 80'unum.

Við sangum sum Eg Siti So Eina, Motormani, Ró og Sildarok í Singapoore gjørdust Vestmenn ein tann mest spældi bólkurin í føroyska útvarpinum. Sangirnir hjá teimum blivu ein fyri og annar eftir landskendir, og nú 25 ár seinni kunnu Vestmenn fara á pallin við eini langari røð av hittum og kendum sangum.

Vestmenn hava hildið drúgvan steðg seinastu árini. Høvuðsmenninir í bólkinum, Martin Joensen og Ólavur Højgaard, hava givið tónleik út hvør sær, men nú finna teir saman aftur til eitt comeback við Vestmonnum.

Øll tann upprunaliga manningin savnast aftur til framførsluna á Summar Festivalinum, og umframt Ólav og Martin umfatar bólkurin eisini Niels Olsen, Boga Olsen, Jógvan í Toftum Olsen og kórsangararnar Rúnu á Heygum og Jórun Højgaard.

Tað er sanniliga orsøk til at gleða seg til eitt tað største comebackið í føroyskum tónleiki seinastu árini – útsett eitt ár, men ikki minni spennandi av teirri orsøk.

# Safir



**Vísubólkurin Safir pakkar sínar frálíku sangir í viðførið og setir í august kós ímóti Klaksvík, har teir gera comeback við framførslu á Summar Festivalinum.**

**Tað var í 1996, at Safir kom við sínari einastu útgávu higartil. Meðan aðrir bólkar royndu at blása alt um koll við hørðum, alternativum rocktónleiki, legði Safir á ein annan bógv. Við einføldum útsetingum av egnum sangum fingu teir fastatøkur á føroyingum, og perlurnar hjá Safir eru framvegis at hoyra.**

**Sangir sum Høgra Jam, Tú ert so deilig, Mánin og aðrir fullu væl í oyrað, og teir eiga sítt sjálvsagda pláss onkra staðni mitt í føroyska sangskattinum frá 1990'unum.**

**Tór Verland Johansen og Janus Trygvason manna bólkin Safir.**




Eighteen Hands er ein heilt serligur tónleikabólkur, sum føroyingar ikki áður hava upp livað

# Eighteen Hands – har øll eru við

**Bólkurin Eighteen Hands spælir kendar slagarar, og orðini verða samstundis framførd á teknmáli**

Tað byrjaði við, at Summarfestivalinumfekk eitt sms frá Gudrun, sum helt deyvabólkin Eighteen Hands burdi spælt á Summarfestivalinum.

Tá ið Steintor Rasmussen, eitt sindur góðvarin royndi at ringja til nummarið hjá Gudrun Nadju Olesen, varð hann avbrotin beinanvegin. Ikki so løgið. Eitt minutt seinni kom næsta sms ið. »Jeg glemte at skrive, at jeg er døv , så jeg tager ikke telefonen.«

Er ein deyvur, so er telefonin góð at senda og lesa sms, men tú hoyrir sjálvandi ikki ein, sum tosar ella rópar í hinum endanum.

Men aftaná seinna snarboðið og eftirfylgjandi teldubrøv so varð bæði gott samband og samskifti millum partarnar.

- Jú, eg havi hoyrt bólkin í venjingarhølunum í Keypmannahavn. Tey spæla og syngja sum eitt gott vanligt orkestur, men øll orðini verða samstundis framførd á teknmáli. Tað var ein heilt serlig uppliving, sum ivaleyst fleiri festivalgestir fara at fáa nógv burturúr, sigur Steintór, ið fegnast um at sjáldsami bólkurin verður at hoyra og síggja á Summarfestivalinum.

## Slagarar á skránni

Eighteen Hands byrjaði í 1995, har trý starvsfólk sum arbeiddu við teknmáli høvdu serligan áhuga fyri tónleiki. Tey byrjaðu bólkin KC-bandin, sum seinni bleiv til tær nýggju hendurnar. Seinni eru nýggj andlit og hendur komnar í bólkin, sum í Føroyum verður mannaður við fýra monnum handan tangentar, trummur, bass og gittara, meðan tær báðar Ditte syngja – onnur við góðum og svingandi vokali, hin við hugtakandi og sigandi teknum og kropsmáli.

Bólkurin spælir kendar slagarar, alt frá Kim Larsen til Eric Clapton. Deyvabólkurin er ein nakað heilt serligt, og kortini so einfalt, at øll á sín hátt  kunnu syngja við.